# Muslimar gráta um Jesus



*Komandi vikurnar fara túsundtals arabiskir muslimar at síggja rámandi filmin um líðing Jesusar. At filmurin yvirhøvur er frígivin í muslimsku londunum, hevur loypt hvøkk á fólk*

**Heilt óvæntað er filmurin hjá Mel Gibson, um líðing Kristusar, sýndur í arabisku biografunum. Osøkin er, at filmurin har verður mettur at vera anti-jødiskur, skrivar blaðið, Prayer News Alert**

LÍÐING JESUSAR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Úr Kuwait frætta vit, at filmurin, The Passion of The Christ, er so væl umtóktur, at allir filmar eru tiknir av skránni.

At filmurin yvirhøvur er frígivin í muslimsku londunum, hevur loypt hvøkk á fólk. Orsøkina siga tey vera, at filmurin har verður mettur sum anti-jødiskur.

Komandi vikurnar fara túsundtals arabiskir muslimar at síggja rámandi filmin um líðing Jesusar.

Ein trúboðari í Qatar, sigur, at hann hevur sæð filmin saman við muslimum, sum róptu og grótu og vamlaðust yvir ringu viðferðina, ið Jesus fekk.

Í bønarbrævi, sum Prayer News Alert sendir út, verður heitt á tey trúgvandi um at biðja og at vera tilreiðar at taka sær av teimum, sum verða ávirkaði av filminum.

Tað ljóðar, at sjálvt í Saudi Arabia, har eingi filmshøli eru, fara fólk at fáa møguleika at síggja filmin á "pirat kopieraðum" fløgum.

Millum arabararnar, sum hava sæð filmin, er eisini palistinesiski leiðarin, Yasser Arafat. Eftir filmin úttalaði hann seg positivt, og hevur hetta fingið ísraelsmannin og friðaraktivistin, Uri Avnery, at senda Arafat eitt langt mótmælisskriv. Hann endar bræv sítt við at siga:

"Tá friðurin kemur, skulu vit øll møtast í Jerusalem, jødar, kristin og muslimar. Eg veit, at eisini tú, eins og eg, droymir um hetta. Lat okkum vóna, at tað fer at eydnast okkum báðum at síggja hetta við okkara egnu eygum".

# Gibson ristir heimin

**Filmurin, The Passion of The Christ, varð frumsýndur í Danmark um vikuskiftið. Ummælini eru misjøvn um allan heim, men áhugin fyri filminum er helst tann størsti nakrantíð**

LÍÐING KRISTURSAR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*48 ára gamli, Mel Gibson, ristist ikki á hondunum, tá hann skrivaði filmin um líðing Jesusar. Men rámandi filmurin hevur sanniliga skakað heimin*

Filmurin, sum Hollywood ikki vildi nerta við einum eldklova, hevur í minni enn 4 vikur vunnið meira enn tað tíggjudupulta innaftur av teimum 30 milliónum dollarum, sum Mel Gibson sjálvur gjørdi av at leggja í bannlýstu verkætlanina.

Hetta skrivar Politikken fríggjadagin í seinastu viku.

Í ummæli sínum í Politikken, skrivar Kim Skotte, at filmurin er ein rúkandi uppgerð við kristindómin sum eina "gratis-religión", sum hann málber seg. Skotte gevur filminum 5 av 6 hjørtum.

- Frammanfyri gánandi hyggjarunum, sveiggjar Mel Gibson blóðsprongda offurlambið. Hann fór í deyðan fyri tykkara skuld! Einki annað! Og tí er tað, at filmurin er so sterkur. Leikstjórin er sterkur í trúnni og ristist ikki á hondunum, skrivar hann.

Um Gibson ikki ristist á hondunum, tá hann skrivaði filmin, so hevur filmurin rist heimin. Tíðindi frættust um tveir prestar, sum kollapsaðu, tá tey sóu filmin. Fleiri eru eisini kropin til krossin og farin til løgregluna fyri at melda áragomul brotsverk.

Fara vit aftur til ummælini, eru ikk øll eins góð, sum tey hjá Politikken. Ekstra Blaðið og Information geva filminum einans eina stjørnu hvør.

Henrik Queitsch hjá Ekstra Blaðnum fordømir nærmast innihaldið av filminum, sum hann sigur vera, "126 minutters modbydelig og vulgær religiøs propaganda".

Tað er ikki bert millum donsku ummælararnar, at ósemja er um filmin. Eisini í USA og í Onglandi eru ummælini misjøvn, og tað fara tey ivaleyst eisini at verða í hinum londunum, so hvørt filmurin verður frumsýndur.

Í enska blaðnum, The Sunday Times, skrivar ummælarin og jødin, Cosmo Landesman soleiðis:

"Lat meg sum jøda siga tað hart og týðiliga: Ja, vit gjørdu tað. Vit hongdu hann. Ert tú so ikki glaður um, at eg segði tað? Og nú - øll tit góðu kristnu - farið avstað og gerið tykkara kristnu skyldu - fyrigevið!".

Umtalan, sum filmurin hevur fingið, hevur nátt ørandi dimensjónum, og eftir øllum at døma fer undirtøkan í USA framum bæði "Ringana Harra" og "Harry Potter".

Filmurin, The Passion of The Christ, verður frumsýndur í Havnar Bio, fríggjadagin 23. apríl klokkan 18. Sýningarnar verða tríggjar um dagin fram til og við 29. apríl. Forsølan byrjar 12. apríl.

Síðani fer filmurin til Tvøroyrar og eftir tað til Klaksvíkar.

# 12 tímar sum broyttu heimin

**Samtalan er skorin niður at verða so lítil sum gjørligt, og tað eru myndirnar, ið siga frá øllum í harðliga, men hugtakandi filminum hjá Mel Gibson um seinastu tímarnar av lívi Jesusar**

LÍÐING JESUSAR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Við filminum, The Passion of The Christ, hevur Mel Gibson sett eina feita striku undir síni evni sum filmsframleiðari. Agjørt eingin trúði, at filmurin, sum nú vísir seg at fara at verða ein av størstu eydnufilmunum í søguni, kom at vinna so nógvan pening*

The Passion of The Christ er ein filmur um 12 teir seinastu tímarnar av lívi Jesusar. Filmurin byrjar í Getsemane urtagarði, har Jesus eftir seinastu kvøldmáltíðina er farin við lærusveinum sínum at biðja.

Her stendur hann ímóti freistingum Satans og verður síðani svikin av Judasi. Jesus verður tikin til fanga og førdur til Pilatus av høvuðsprestunum og teimum skriftlærdu, sum ákæra hann fyri mangt.

Rǽttargongdin endar við, at Jesus verður dømdur at líða krossdeyðan.

Tað er Mel Gibson, sum bæði hevur skrivað og leikstjórnað filminum, ið hevur elvt til rǽttiliga øsing millum fólk.

Handritið er skrivað í samstarvi við Benedict Fitzgerald, sum er kendur fyri eitt nú filmarnar, Wise Blood, In Cold Blood, Heart of Darkness og Zelda.

Allir leikararnir tosa tað málið, sum varð nýtt í tíðini, tá hendingarnar fara fram. Jesus og lærusveinarnir tosa arameiskt, eins og jødarnir. Romarnir tosa latín. Grikst varð eisini tosað har um leiðir, men tá á døgum varð tað vanliga bara nýtt av teimum intellektuellu, og er tí ikki at hoyra í filminum.

Filmurin er tikin upp í Italia. Sjálv krossfestingin varð filmað í vakra býnum, Matera í sunnara parti av Italiu.

Jerusalem er í filminum skapaður við eini stórslignari pallmynd og er konstrueraður á vælkenda Cinecitta Studio, sum liggur í útjaðaranum av Rom.

Hetta bergtakandi pallkompleksið, sum kendi pallmeistarin, Francesco Frigeri og set-prýðarin, Carlo Gervasi, hava gjørt, umfatar eisini templið, har rættargongd Jesusar fór fram, garðin, har tær ymisku dómsviðgerðirnar vóru og staðið, har Jesus varð pískaður og píndur.

Høvuðsleiklutin sum Jesus, hevur James Caviezel. Hinir leikararnir eru, Monica Bellucci, Claudia Gerini, Maia Morgenstern, Sergio Rubini.

Við filminum, The Passion of The Christ, hevur Mel Gibson sett eina feita striku undir síni evni sum filmsframleiðari. Eingin vildi geva filmin út, áhugin at fíggja var heldur ikki til staðar, og avgjørt eingin trúði, at hesin filmur kom at vinna so nógvan pening. Men Mel Gibson trúði uppá filmin, sum nú vísir seg at fara at verða ein av størstu eydnufilmunum í søguni.

Tilfarið, ið er at finna á internetinum um filmin, er nærum óendaligt. So, hevur tú góða stundir á páskum, far so inn á eitt nú Google og leita eftir The Passion of The Christ.



**-Vilja vit hava ein lættisoppakendan og hugnaligan kristindóm, er "The Passion of The Christ" hjá Mel Gibson ein óhóskandi filmur um Jesus, sigur havnarmaðurin í Odense, Árni Helmsdal, sum mánakvøldið varð eygnavitni til Jesu líðingar í kykmyndahøllini. Árni Helmsdal metir, at skelkandi filmurin ger upp við "gratis kristindóm" og kann elva til økta polarisering í føroyska trúarlívinum**

JESUS FILMUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*- Har hevur verið nógv blóð tann dagin á Golgata og tímarnar frammanundan, og tískil er filmurin ikki ov blóðugur og harðskapssinnaður, heldur Árni Helmsdal, sum mánadagin sáð James Caviezel í høvuðsleiklutinum sum píndi og krossfesti Jesus*

# Uppgerð við ókeypis kristindóm

Nú nýggi og umstríddi Jesus filmurin hjá Mel Gibson verður vístur í Danmark um páskirnar, er kjakið um filmin veruliga komið í hæddina í donsku fjølmiðlunum, og áskoðanirnar og skoðsmálini fevna heilt frá botn- til toppkarakter.

Havnarmaðurin Árni Helmsdal, sum í nógv ár hevur búð í Odense í Danmark, varð mánakvøldið eygnavitni til harðskapskenda og blóðiga filmin um Jesu líðingar, sum á fyrsta sinni verður vístur í Føroyum 23. apríl. Árni er ikki í iva um, at talan er um ein sterkan film, sum uttan iva fer at elva til kjak í føroyska trúarsamfelagnum.

Árni Helmsdal hevur sjálvur leingi verið virkin í føroyskum og donskum trúarlívi, og hevur hann sínar hugsanir um umstrídda filmin um timburmannin úr Nazareth.

## Polarisering

- Eftir mínum tykki kann filmurin saktans elva til eina polarisering. Tey, sum frammanundan eru persónliga trúgvandi, kunnu gerast meira gripin av Jesusi, meðan hin parturin kann meta filmin at vera reina harðskapspornografi og átrúnaðarlig propaganda, sigur Árni Helmsdal. Tó vónar hann ikki, at hetta í ov stóran mun verður avleiðingin av filminum.

- Polariseringin millum trúgvandi og ikki-trúgvandi er um okkara leiðir ríkilig sum er, og tískil er at vóna, at filmurin ikki setir kílar ímillum báðar partarnar, heldur Árni Helmsdal.

"The Passion of the Christ" rørir sambært Árna hyggjaran á ymsan hátt, og serliga var sjónligt í stóru kykmyndahøllini í Odense mánakvøldið, at talan ikki var um ein og hvønn film.

- Fólk sótu í tøgn í stólum sínum leingi eftir, at Jesu pínslur og líðingar endiliga vórðu lidnar á hvíta løriftinum, og slíkan stemning upplivir ein ikki vanligt í biografinum eftir ein vanligan film, greiðir Árni Helmsdal frá.



*- Vit vilja kanska hava ein barberaðan, lættisoppakendan, blóðleysan og friseraðan kristindóm, men so er hetta ikki ein hóskandi filmur, sigur Árni Helmsdal, sum mánakvøldið sá "The Passion of the Christ" í kykmyndahøllini í Odense*

## Katólsk eyðkenni

Høvuðsmaðurin handan filmin, Mel Gibson, er limur í konservativari katólskari samkomu í USA, og hetta sæst sambært Árna Helmsdal aftur í filminum.

- Katolikkar leggja stóran dent á langa fríggjadag og líðingarsøguna, meðan vit protestantar ofta leggja størri dent á uppreisnina 1. páskadag, og hetta er sjónligt í filminum, sigur Árni Helmsdal.

Meðan líðingar Jesusar verða penslaðar út á stóra hvíta løriftinum í tveir tímar, er bert ein heilt lítil løta móti endanum sett av til sjálva uppreisnina.

- Tað er gott, at Mel Gibson tó hevur uppreisnina við í stuttum at enda, tí annars var hesin filmurin á ymsan hátt í somu skuffu sum Jesus Christ Superstar, sum endar langafríggjadag, og tað hevði verið ein punkteraður boðskapur, heldur Árni Helmsdal.

Umframt hesi eyðkenni við líðingarsøgu Jesusar vísir Árni á, at katólska mentanin í størri mun nýtir myndir og málningar í dagligu gudsdýrkanini, og eru katolikkar tí møguliga meiri vanir við eygunum at síggja og eygleiða tað, kristna trúgvin er bygd á.

- Tískil er talan møguliga um eina størri broyting fyri okkum protestantar, at vit knappliga hava møguleikan at síggja ræðuliga krossdeyða Jesusar, tí fert tú inn í eina vanliga protestantiska samkomu í dag, sært tú ongar myndir hanga á veggjunum, meðan krossurin, sum er eitt ræðuligt torturinstrument, aloftast sæst tómur og verður nýttur til prýði her um leiðir, vísir Árni á. Tískil kann talan eisini vera um átrúnaðarligar mentanarsaman-stoytir, nú Jesus filmurin gongur kring heimin og kemur til Føroya 23. apríl.

## Eingin antisemitisma

Um sjálvt innihaldið í filminum heldur Árni, at hann í stóran mun livir upp til væntanirnar um ein professionellan film.

- Tað tyktist náttúrligt, at tey tosaðu upprunaligu málini frá tíð Jesusar, og tað hevði ikki hóskað við amerikanskum í hesum filminum vegna trúvirði í dialogunum, heldur Árni Helmsdal.

Árni vísir víðari á, at góð klipp eisini eru at síggja aftur til páskamáltíðina, fjallaprædikuna og aðrar hendingar, sum gevur gott perspektiv, og talan er tí altso ikki bert er um blóð og pínslu.

Ein av mest óvæntaðu hendingunum í filminum er sambært Árna Helmsdal, at freistarin (óndskapurin) er persónsgjørdur í einum undarligum og óhugnaligum blandingsfiguri millum mann og kvinnu, sum serliga er sjónligur í Getsemane. Annars er ein av dygdunum, at persónarnir eru dynamiskir og veruleikakendir, meðan góði tónleikurin stuðlar væl undir innihaldið í filminum.

Ein høvuðsákæra mótvegis Gibson og hansara Jesus filmi er, at hann eggjar til antisemitismu, men hetta metir Árni Helmsdal ikki.

- Var filmurin antisemitiskur? Nei - vit hildu øll pískinum. Eg kendi meg sekan í brotsgerðini móti Jesusi. Hvussu hevði eg borið meg at, um eg stóð í fjøldini, spyr Árni Helmsdal.

## Uppgerð við gratis kristindóm

Umframt antisemitismu hava høvuðsatfinningarnar mótvegis filminum verið, at talan í veruleikanum er um tveir tímar við reinari harðskapspornografi og átrúnaðarpropaganda. Árni Helmsdal hevur ta áskoðan, at eingin orsøk er at fjala tað, sum søguligu keldurnar greiða frá um Jesus.

- Ov nógv blóð? Har hevur verið nógv blóð tann dagin á Golgata og tímarnar frammanundan. Ov nógv sjónlig pínsla? Teir píndu hann so illa, at hann til seinast doyði av tí, heldur ein avgjørdur Árni Helmsdal, sum metir filmin vera trúgvan mótvegis skriftunum, hóast mel Gibson av og á hevur nýtt síni kreativu evni.

Føroyingurin í Odense vísir til seinast á, at filmurin í framtíðini avgjørt kann broyta okkara siðbundnu hugsanir og fatanir av Jesusi og kristindóminum.

- Vit vilja kanska hava ein barberaðan, lættisoppakendan, blóðleysan og friseraðan kristindóm? Kanska eisini ein saft- og kraftleysan? Men so er hetta ikki ein hóskandi filmur, tí hann avdúkar og perspektiverar okkara siðbundnu fatan, vísir Árni Helmsdal á.

Ein ummælari skrivaði, at hesin filmurin revsaði okkum øll við píski fyri okkara gratis kristnitrúgv. Árni Helmsdal vísir á, at júst hetta er ein høvuðsboðskapur.

- Týski guðfrøðingurin Bonhoeffer, sum doyði í fangalegu stutt áðrenn krígslok, skrivar nógv um "bíliga náði", har vit taka kristindómsins náði og frelsu sum eina sjálvfylgju. Hesin filmurin vísir, at náðin ikki er bílig, tí Jesus ikki slapp bíliga, staðfestir Árni Helmsdal, sum nú sigur seg fara at lesa Páskaevangeliið á øðrvísi hátt.

- Eg hevði okkurt við mær til matna; men eg rørdi ikki matin, so rørdur var eg av filminum, og eg gevi "The Passion of the Christ" hjá Mel Gibson fimm útav fimm tornakrúnum, endar Árni Helmsdal.